# Koyri-kort?

Teoriskeið
til persónbil
byrjar
**týsdagin**
**19. august**
**kl. 17.00**

Teoriskeið
til motorsúkklu
byrjar
**týsdagin**
**19. august**
**kl. 17.00**

FØRARASETRIÐ
KOYRISKÚLI

**Rúni Christiansen**
tel 21 47 65
**John A. Christiansen**
tel 21 47 75

Jekaragøta 10 • Tórshavn



Lesið
**Sosialin**
-tað loysir seg


Starvslýsing

Trivnaðartænastan

## Pedagogur til Sambýlið á Bóndaheyggi 14

Søkt verður eftir pedagogi til Sambýlið á Bóndaheyggi 14 til setan 1. oktober, ella eftir nærri avtalu.

Talan er um fulltíðarstarv við skiftandi arbeiðstíðum. Arbeitt verður í dag-, kvøld-, nátt-, og vikuskiftisvaktum (3.hvørt vikuskifti) og serstakar frídagar.

Sambýlið á Bóndaheygi er heim hjá 5 búfókum. Endamálið er at skapa eitt trygt, mennandi heim og umhvørvi fyri hvørt búfólk. Í sambýlinum arbeiða 10 starvsfólk.

**Førleikakrøv**
- vera sálarliga og likamliga væl fyri
- fara til ymisk tiltøk við búfólkunum
- arbeiða sjálvstøðugt
- samstarva við aðrar fakbólkar
- kunna taka ábyrgd og avgerðir í arbeiðnum

**Vit bjóða**
- menningarmøguleikar
- ávirkan á innihaldið í arbeiðinum.

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Um pedagogur, ið frammanundan er tænastumaður, verður settur í starvið, heldur tænastumanna-setanin fram, og verður lønin sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Um eingin peda-gogur søkir starvið, verður starvið sett við hjálparfólki sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmála-ráðið. Setanarøkið umfatar Nærverkið og deildir undir tí.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja til tlf. 211968.

**Umsókn**
Umsókn við próvskjølum, viðmælum og C.V. skal sendast til:
Sambýlið á Bóndaheygi 14
100 Tórshavn
Stílað: Leivur Holm

**Umsóknarfreist: 1. september 2008**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

TVØROYRAR KOMMUNA



# Matútkoyring og koyritænastur

## til pensjónistar í Tvøroyrar, Hvalbiar, Famjins og Sumbiar Kommuna

Tvøroyrar, Hvalbiar, Famjins og Sumbiar Kommuna hava avgjørt at samstarva á eldraøkinum við tí endamálið at økja tænastustøðið fyri tey eldru í kommunum.

Sum eina avleiðing av hesum kann Sosiala Deild bjóða hesar tænastur:

• Pensjónistar hava nú møguleika fyri at fáa eina heita máltíð um dagin koyrda heim til sín allar gerandisdagar. Maturin verður gjørdur á Suðuroyar Sjúkrahúsi og verður koydur út um døgurðaleitið. Prísurin fyri hvørja máltíð er 25 kr. (35 kr. aftaná 1. august 2008) + 10 kr. fyri útkoyringina. Tey, sum ynskja at gera brúk av hesari tænastu, vera biðin um at seta seg í samband við heimahjálpina á tlf. 373907. Tænastan er treytað av tørvi. Heimatænastan metir í hvørjum einstakum føri um tørvin.

• Pensjónistar hava eisini møguleika fyri at fara til eldra-hugna í høllini í Trongisvági. Áhugaði kunnu seta seg í samband við Annu Sólrun Djurhuus fyri at fáa meira at vita.

• Pensjónistar hava møguleika fyri at fáa koyring til og frá eldrahugna. Hendan tænastan kann eisini brúkast til onnur endamál. Tildømis um pensjónistar hava brúk fyri at fara til frisør, fótterapeut, lækna ella líknandi. Tey sum ynskja at gera brúk av hesari tænastuni kunnu seta seg í samband við Mikjal Paula Johansen á tlf 226566.

Treytirnar fyri at fáa hesar tænastur er, at ein er 67 ár og fólkapensjónist ella er fyritíðarpensjónist.






# Renault Laguna til sølu

Bilurin er frá desember 1998. Hevur fløgu-spælara og el-rútar. Bilurin er enskur, men er skrásettur í Føroyum og er góður at koyra.

Verður seldur **SERA BÍLIGA** vegna flyting.

**Áhugaði kunnu ringja á tel. 222081**

umhvørvisstovan

# Fráboðan um umhvørvisgóðkenning

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Umhvørvisstovan tann 14. juli 2008, við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988 um umhvørvisvernd, sum broytt við løgtingslóg nr. 25 frá 14. mai 2008, og kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 grein 1, nr. 4 og 4a, seinni broytt í grein 5, nr. 1 og 4 í kunngerð nr. 90 frá 28. september 2007, hevur góðkent:

**Smoltstøðina hjá P/F Vestlax á Viðareiði (S-21)**

Góðkenningin liggur alment frammi á Umhvørvisstovuni. Avgerðin kann kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Møgulig kæra skal sendast Umhvørvisstovuni, Traðagøta 38, FO-165 Argir, í seinasta lagi fýra vikur frá dags dato.

Góðkenningin kann somuleiðis síggjast á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni, www.us.fo.

**UMHVØRVISSTOVAN**

# Íbúð ynskist

Íbúð ynskist til leigu í Havn frá 1. desember til eldri mann. Eri friðarligur og fari væl um.

Ring á tlf. 211322